# Útbjóðingarskriv

## Leitað verður eftir veitara at standa fyri førleikamenning innan verkætlanarleiðslu á Gjaldstovuni

## Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni vilja vit gera Føroyar effektivari.

Hetta stóra mál royna vit at lyfta á fleiri mótum. Vit vilja, at okkara landsbúskapur er skynsamt fíggjarstýrdur við neyvum fíggjartølum. Vit vilja, at stovnar landsins skulu hava bestu og mest framkomnu kt-loysnir. Vit vilja, at innkeyp hjá landinum verður kappingarútsett, so vit fáa meira fyri peningin. Og so vilja vit ganga undan at gera Føroyar til eitt av mest talgildu samfeløgum í heiminum.

Á Gjaldstovuni starvast umleið 70 fólk.

## Okkum tørvar

Fyri Gjaldstovuna er tað týðandi, at okkara starvsfólk menna førleikar innan verkætlanararbeiði, bæði tá ið talan er um luttøku í verkætlanum, verkætlanarleiðslu og sum limir í stýrisbólkum, við tí endamáli at:

- økja førleikan hjá stovninum at fremja verkætlanir við størri effektiviteti og góðsku
- skapa eina felags mentan, mál og fatan fyri verkætlanum
- skapa eitt sterkt netverk millum verkætlanarstarvsfólk.

Tí ynskir Gjaldstovan at bjóða út undirvísing í verkætlanararbeiði. Undirvíst verður fyri starvsfólkunum á stovninum.

### Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við ein veitara, sum skal bjóða fram navngivið starvsfólk, sum hevur allar teir førleikar, okkum tørva. Vit kundu hugsað okkum, at sami persónur stendur fyri allari undirvísingini.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði.

Talan er sum útgangsstøði um eingangsveiting, sum er lýst niðanfyri, men tað kann koma upp á tal at leingja sáttmálan við fleiri uppgávum innan førleikamenning í verkætlanararbeiði. Tí vilja vit hava ein prís fyri eingangsveitingina og ein tímaprís fyri eyka tímar. Sáttmálatíðarskeiðið er tí sum útgangsstøði í eitt ár við møguleika fyri at leingja upp í trý ár, um báðir partar vilja tað.

Sáttmálauppskot verður hjálagt.

## Veitingin

Veitarin skal undirvísa hesum bólkum: Verkætlanarluttakarum (á leið 30 luttakarar), verkætlanarleiðarum (á leið 15 luttakarum) og styrisbólkalimum (á leið tíggju luttakarar). Vit ímynda okkum, at undirvísingin og úrtøkan fyri hvønn bólk verður henda:

Undirvísing fyri verkætlanarluttakarar verður skipað sum:

- eitt undirvísingarmodul á ein dag
- alt eftir tali av luttakarum ella møguleikum, kunnu fleiri modul skipast.

Úrtøkan fyri verkætlanarluttakarar er at læra:

- fakliga verkætlanarterminologi
- at luttaka trygt verkætlanarfakliga í framtíðar verkætlanum.

Undirvísing fyri verkætlanarleiðarar verður skipað sum:

- tvey undirvísingarmodul á tveir dagar, har uppgávur eru millum modulini
- coaching seansur millum tey tvey modulini til uppgávurnar.

Úrtøkan fyri verkætlanarleiðarar er at:

- læra at virka sum verkætlanarleiðarar á verkætlanum á stovninum
- hava grundarlag fyri at kunna verða góðkendir sum verkætlanarleiðarar eftir skeiðið.

Undirvísing fyri styrisbólkalimum verður skipað sum:

- eitt venjingarmodul á ½ dag
- eitt ella fleiri modul, alt eftir tali av luttakarum ella møguleikum.

Úrtøkan fyri styrisbólkalimir er at:

- kenna sín leiklut, ábyrgd og skyldur sum limir í stýrisbólkum.

Harafturat vilja vit hava eina opna tilgongd, ið gjarna tekur støði í ymsum modellum.

Planurin er, at undirvísingin verður á heysti í 2025, eftir avtalu við veitaran.

## Minstukrøv til veitingina

Hesi krøv skal veitarin, sum tað minsta lúka:

- **Mál** Undirvísing skal vera á annaðhvørt føroyskum ella donskum
- **Tilfarið** skal vera annaðhvørt á føroyskum ella donskum
- **Royndir** viðkomandi skal hava minst tvey ára royndir við verkætlanarleiðslu og undirvísing innan verkætlanarleiðslu
- **Undirvíst skal verða við støði í altjóða standardum, so sum**:
  - IPMA/ICB
  - PMI (ANSI standard)
  - Agile metodir, m.a. Scrum, Half Double, SAFe

Tilboð, sum ikki lúka hesi minstukrøv, verða ikki tikin við.

## Tilboðið skal innihalda

Tilboðsgevi skal koma við sínum boði til leist, tilgongd og greiða frá undirvísing og uppgávum.

- Innihaldið av modulum skal vera útgreinað
- Tilfar um klassiska og agila verkætlanarleiðslu
- Upplýsingar um ástøðiliga grundarlagið
- Lýsing av undirvísingini og venjingunum.

**CV hjá undirvísara**

- CV hjá undirvísara við kunning um:
    - Útbúgving
    - Royndir við verkætlanarleiðslu (hvørjar verkætlanir hevur viðkomandi leitt, undir hesum stødd og torgreidleika)
    - Royndir við undirvísing innan verkætlanarleiðslu (á hvørjum stigi er undirvíst á, hvørjum málbólki er undirvíst og hvussu leingi )
- Certifiseringsprógv innan verkætlanarleiðslu (um prógv finst)

**Útfylt tilboðsblað við:**

- Samlað tilboð, har fylgjandi er útgreinað:
    - Tilboð fyri samlaða veiting, har tal av tímum (fyrireiking, undirvísing og uppfylging) er upplýst
    - Tilboð fyri ein tíma (eyka tíma)

Prísirnir skulu verða uttan mvg.

## Hvussu verður vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis: Góðska 50% og prísur 50%

Útrokningin fer fram á henda hátt:

### Góðska

Út frá samlaðari meting av:

- Útbúgving innan verkætlanarleiðslu
- Undirvísing innan verkætlanarleiðslu
- Royndum hjá undirvísara innan verkætlanarleiðslu og undirvísing í verkætlanararbeiði
- Lýsing av venjingum
- Ástøðiliga grundarlagið

- Heildarmynd

verður stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Tá ið dómsnevndin metir um tilboðini, verða hesi viðurskifti vektað:

- Longd av útbúgving innan verkætlanarleiðslu og certificering
- Mongd av undirvísing innan verkætlanararbeiði fyri líknandi stovnum
- Mongd av royndum hjá undirvísara innan verkætlanarleiðslu
- Fjølbroytni, hugflog og nýhugsan í mun til venjingar og undirvísing
- Ástøðiliga grundarlagið er av nýggjari dagfesting
- Heildarmynd og annað viðkomandi, so sum ummælið frá fyrrverandi kundum.

Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, soleiðis sum vit meta um innkomna tilfarið.

## Tímaprísur

Tímaprísirnir verða vektaðir soleiðis:

  - Tilboð fyri samlaða veiting, har tal av tímum (fyrireiking, undirvísing og uppfylging o.a.) er upplýst (80%)
  - Tilboð fyri tímaprís (eyka tímar, leysliga mett á 100 tímar) (20%)

Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50.

Prísirnir skulu verða uttan mvg.

# Dømi um útrokning

Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar og hava ikki viðkomandi ella umfatandi útbúgving. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar og útbúgving er á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir og útbúgvingina. Hesin fær 50 stig.

Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta prísi hjá veitaranum er 50.000 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 65.000 kr. Hetta gevur 50.000/65.000 x 50 = 38,5 stig
Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 80.000 kr. Hetta gevur 500/80.000 x 50 = 31,5 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + prís 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + prís 38,5 stig = samlað meting á 73,5 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + prís 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig. Hesin veitarin vinnur sostatt útboðið.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu sendast til **simunpetur@talgildu.fo**

Spurningar, ið eru settir fyri mánadagin 26. februar 2025, kl. 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 28. februar. 2025, kl. 12.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og øll svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði

Freist **5. juni 2025 kl. 12.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**